nýt hít

FYRIBYRGINGARRÁÐIÐ

*Health promotion advisory committee of The Faroe Islands*

www.fyribyrg.fo



# Lítil grind doyði í Sandágerði



Ein lítil grind legði beinini í Sandágerði fyrrapartin mánadagin.

Ein útróðrabátur fann grindina í Nólsoyarfirði millum Stongina og Eystnes klokkan hálvgum tíggju.

Rakstur feks beinanvegin á grindina og ein tíma seinni var grindin deyð. Einir 30-40 hval løgdu beinini. Og sum vanligt í Havn, var ikki trot á bátum, hvørki til raksturin ella drápið.



## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara



**Jona Joensen**

doyði og fór til gravar.

*Fyri tey avvarðandi*

**Eyðna, Nanna og Jóan Einar**


## Elektron sigur fýra fólkum upp

UPPSAGNIR

Elektron hevur fýra fólkum úr starvi.

Grundgevingin hjá Niels Christian Nolsøe, stjóra, er at útreiðslurnar eru øktar so nógv og útlit ikki eru fyri størri inntøkum.

– Tá eigararnir av Elektron ikki ynskja, at felagið skal kasta seg út í kappingina við við aðrar útbjóðarar av KT tænastum, verður kundagrundarlagið, sum í høvuðsheitum er pengingastovnar og Toll- og Skattstova Føroya, tað sama í 2004 sum í 2003, sigur Niels Christian Nolsøe, stjóri.

– Toll- og Skattstova Føroya, sum stendur fyri umleið 20% av umsetninginum, hevur boðað frá, at fíggjarætlanin í 2004 er skerd, soleiðis at samlaða gjaldið til Elektron verður tað sama í 2004 sum í 2003.

Felagið hjá starvsfólkunum á Elektron hevur góðkent uppsøgnirnar.

Hans Jákup Langgard, formaður í felagnum, sigur, at felagið fer einki at gera við uppsøgnirnar.

– Eg havi ikki aðra viðmerking enn, at hetta er ikki eitt fakfelagsmál, sigur Hans Jákup Langgaard.

# Hildu jól í Havn

JÓL

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



Um vikuskiftið var skjøtil settur á jólini í Havn. Leygardagin var jólatræið á Vaglinum tendrað. Har vóru røðu hildnar av Jan Christiansen, borgarstjóra og Hera Joensen, presti. Ung Stjørnuskot sungu á Glade Hjørn, og jólamenn gingu í býnum og góvu børnum góðgæti.

Tórshavnar Sløkkilið er eisini vorðin fastur fúsur til jólahaldið í Havn við gamla Triangel brandbilinum frá triatiárunum, ið eisini setir serligan dám á.

Sunnudagin skipaði Lions fyri jólahaldi í Viðarlundini í Havn, har nógv fólk leitaði sær í góðveðrinum.

Hornorkestrið GHM spældi jólaløg, meðan fólk høvdu høvi at keypa sær heitt kakao ella kaffi og vaflur og bollar. Eisini í Viðarlundini vóru jólamenn í jólahýri og gleddu børnini.

Jólatrøini á Argjum, Hvítanesi, Norðradali og í Kollafirði verða tendrað næsta vikuskifti.





